

**Í SERFLOKKI**

*Suðuroyggin er heilt í serflokki sum ferðamál, tí her er nógv, sum tað ikki ber til at síggja og uppliva aðrastaðni, staðfesti Per Hansen í ferðavinnudeildini í Uttanríkisráðnum á ráðstevnu í Øravík um burðardygga menning*

# Hevði sína bestu feriu í Suðuroy

**FERÐAMÁL** Samskiparin á deildini fyri ferðavinnu í Uttanríkisráðnum, heldur, at Suðuroy hevur heilt serligar møguleikar í ferðavinnuni

Áki Bertholdsen

Suðuroy hevur heilt serstakar møguleikar í ferðavinnuni, tí her kunnu ferðafólk uppliva nógv, sum tey onga aðrastaðni kunnu uppliva.

Tað staðfesti Per Hansen á ferðavinnudeildini í Uttanríkisráðnum, á ráðstevnuni í morgun um burðardygga menning í Suðuroy.

Eitt av evnunum var burðardygg ferðavinna. Í hesum sambandi heldur Per Hansen, at møguleikarnir fyri eini ferðavinnu í Suðuroy eru so góðir, at oyggin má metast at vera í eini serstøðu.

- Ferðavinna kastar nógv av sær, tí hon krevur nógva arbeiðsorku við tað, at talan er sum oftast um eina beinleiðis tænastu frá veitara til brúkara.

Sjálvur hevði Per Hansen verið í Suðuroy og ferðast í fýra dagar, einaferð fyri nøkrum árum síðani, tá ið hann og húski ferðaðust í egnum landi.

- Tað er ein tann besta feria, eg havi havt, staðfesti hann.

Hann segði, at hóast tey høvdu gist ókeypis, tí tey gistu privat, løgdu hann og húskið einar 2000-3000 krónur eftir seg í Suðuroy á matstovum, í handlum av ymsum slagi og til annað.

**» Vit brúktu 2000-3000 upp á fýra dagar**

## Út á eggina

Eitt, sum ger Suðuroy til nakað fyri seg, er náttúran.

Náttúran í Suðuroy er øðrvísi enn alla aðrastaðni í landinum.

- Eitt, sum er heilt sermerkt í Suðuroy, er, at ongastaðni eru bjørgini so lætt atkomulig, sum her, tí nógvastaðni eru vegir heilt út á eggina og aðrastaðni er heilt stutt og lætt at ganga.

Vestmannabjørgini eru tiltikin, men hagar skalt tú sigla eina góða løtu. Í Suðuroy ber nógva staðni til at koyra út á eggina og síggja tey stórfingnu bjørgini úr erva.

Annars hava suðuroyingar nógv, sum ongin annar hevur, eitt nú kolanámini í Hvalba, fyrsta føroyska flaggið í Fámjin, grindabátarnar og sluppina Johonnu í Vági.

**» Ongastaðni eru bjørgini so lætt atkomulig**

Í Suðuroy er eisini best røkta bygd, sum er Fámjin og Hvannhagi, norðanfyri Tvøroyri er kosin sermerktasta náttúruøkið í landinum.

Og oman á alt eru so søgurnar og sagnirnar, sum tað er nógv av í Suðuroy.

- Ferðafólk leita í størri og størri mun eftir óspiltari náttúru og her kann Suðuroy gera seg galdandi við fjøllum, bjørgum, nógvum bygdagøtum og so víðari.

*aki@sosialurin.fo*

## MÁ LYFTAST

Skal ferðavinnan í Suðuroy mennast, er tað neyðugt at vinnan sjálv tekur hetta í álvara, tí tað er hon, sum skal skapa tilboðini til ferðafólkið.

Men Per Hansen legði afturat, at tað er dýrt at ferðast í Føroyum og tað er heldur ikki bíligt at keypa vørur og tænastur.

- Av tí, at prísirnir eru so høgir, setir ferðafólkið eisini høg krøv, tí samsvar skal vera ímillum prísir og tænastu.

Av tí sama mugu tænastur verða á høgum støði, segði Per Hansen,

Ein arbeiðsbólkur, sum viðgjørdi ferðavinnuna, staðfesti, at í Suðuroy eru hvørki gistingarmøguleikarnir ella matstovumøguleikarnir, nóg góðir.

Serliga fýltist arbeiðsbólkurin á, at matstovurnar hava ov lítið opið og at tað ikki er óvanligt, at ferðafólk koma á stongdar dyr, so at tað er ómøguligt at fáa nakað at eta.

Arbeiðsbólkurin helt, at tað átti at borið til hjá matstovuni at samskipa seg, at tað altíð var ein, sum hevði opið.

Bólkurin fýltist eisini á ferðaætlanina hjá Bygdaleiðum, tí hon er so avmarkað, at hjá ferðafólki, sum dúva upp á bygdaleiðir, er ómøguligt at ferðast kring um í oynni.

Men arbeiðsbólkurin mælti eisini til, at okkurt slag av ferðaleiðarútbúgving varð skipað í Suðuroy.